LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði,ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA CARINA 1.8 GLI
Árg. 1995 til sølu. Prísur: 65.000 kr. ella hægsa boð yvir.
Tlf. 514569

SAAB 9-3
Frá sept. 98, koyrt 70.000 km. við nógvum hentleikum, í finasta standi, til sølu.
Tlf. 314180 ella 224872

NISSAN BLUEBIRD 2.0 LS
árg.89, sýnaður í februar 04. ongan kross.
Tlf. 445138 ella 225998

SPORTFELGUR
4 titanium sportfelgur til sølu, passa til Honda til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221891

MAZDA PREMACY 2.0
grátt metallic árg. 02, aut. gear, koyrt 29.000 km, servostýring, cd-anlegg, rustviðgjørdur 2 ferðir, góð summardekk, pikadekk fylgja við, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 561312/361312

DIESELBILUR TIL SØLU
18d Mitsubitshi Lanser, árg. 86, nýsýnaður. Í góðum standi til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 504040 ella 226886

TIL SØLU
Ford Escort 1.8, diesel, árg. 92 til sølu fyri 11.000 kr. Er í góðum standi og sera økonomiskur. Góður til ein, ið júst hevur fingið koyrikort. Ring
Tlf. 271329

TIL SØLU
Alufelgur við góðum AVON summardekkum, stødd 205/45-16. Passa til BMW E30.
Tlf. 580539

TIL SØLU
Saab 9.5 v/skaða, árg. 98, koyrt uml. 68.000 km, verður seldur fyri 18.000 kr.
Tlf. 583388 ella 580474

BMW-SPORTFELGUR
Originalar BMW-sportfelgur við dekkum til 5-seriuna 205/65 R15, sum nýggjar. Kr. 7.000,-
Tlf. 317035 ella 221100

SPORTFELGUR
Originalar Citröen alu. felgur við dekkum, stødd 195/45 15" heilt bíliga til sølu.
Tlf. 217747

KADET E-GSI
Árg. 89. Nýsýnaður. 2.0 16V, 150 HK ella meir (tunaður), leður, til sølu ella í býti við annan bil, jeep ella MC.
Tlf. 243446 ella 317332

DEKK TIL SØLU
4 lítið brúkt Dayton summardekk stødd 205/55 R16. Hava bert verið brúkt í 14 dagar.
Tlf. 311140

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

TOYOTA COROLLA 1.6 L/B
reyður, árg. 99, km uml. 61.000 í sera góðum standi og annars væl viðfarin til sølu. Prísuppskot: 80.000,- ella gev eitt boð.
Tlf. 216197/229931

CHERVOLET CAMARO COUPE
2 dørs med targatag, rødt metallak, rødt indtræk. Hi jakes, så den kan løftes í enden, 1 ár til syn, árgang 1977. Billede kan sendes med e-mail. Hør nærmere på
Tlf. +45 30200659

TIL SØLU
Lítil, fittur og økonomiskur bilur til sølu vegna flyting Peugeot 106, 1.5 diesel, árg. 97. Koyrt 136.000 km. Anlegg í og pikadekk fylgja við.
Tlf. 312562 ella 512562

EIN FERRARI BILKRANI
BR 250005 til sølu.
Tlf. 332893

TIL SØLU
Mazda 323 1.3 BF, árg. '88 við skaða, km. 156.000, góðan motor, til sølu sum eykalutir. Prísuppskot 3.000 kr.
Tlf. 217006 ella 316297

TOYOTA COROLLA 1.6 XLi
árg. 1992, sýnaður í august 2003. Hevur sportfelgur og pikadekk á felgum fylgja við. Útstoyt og stoytdoyvarar eru skiftir og er í sera góðum standi.
Tlf. 260590, Saltangará

TIL SØLU
Toyota Corolla Galla 1.3, árg. 95. Er í sera góðum standi. Hevur 16'' felgur, vel og powerstýring o.a.
Tlf. 227248 ella 441428

15" ALU-FELGUR
við dekkum til Toyota Carina II til sølu.
Ring 214100

KEYP MEG
Citroen Saxo 1.4, árg. 2001, 5 hurðar, bláur, til sølu vegna flyting. Prísur 90.000,- ella hægsta boð yvir.
Tlf. +45 20986153/251521

TOYOTA COROLLA 1,1 TIL SØLU
typa ae92, árg.88-90 skal til umsýn, ca. kr. 4.000,-
Tlf. 228347

VOLVO 440 DL
Grønur Volvo 440 DL árg. 91 til sølu fyri kr. 12.000,- Sýnaður mars 04.
Tlf. 221310

EIN SERA ØKONOMISKUR
Ford Fiesta 1.8 Diesel frá 09/94 til sølu. Bilurin er nýsýnaður, hevur tvey sett av felgum v/ dekkum (14" Sportfelgur) cd/mp3/wma-spælara. Kamreim, dynamoreim, dynama, stoyt-doyvarar, oljufiltur, olja, bremsurør, svingarmar, stýriliið og akkumulatur nýliga skift. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 250692/251819

AUDI A4, 1.9 TDI
110 HK, árg. des.'96, automatisk gear, klimaanleg, summardekk á sport felgum og spildurnýggj heilársdekk fylgja við. Til sølu
tlf. 448198 og 748198

VW PASSAT
WV Passat nýsýnaður juni 2004, árg. 87. Til sølu fyri 6000 kr.
Tlf. 447830

PEUGEOT 206
Ein svartur Peugeot 206 S16, árg. 2003 við tveimum hurðum til sølu. Bilurin er sera væl hildin. Ring og hoyr meiri á
tlf. 506610

TIL SØLU
Ford Fiesta 1.6 D árg. 87, krevur áboður til sølu fyri 1500 kr.
Tlf. 255591

NISSAN PATROL
4 x 4 Nissan Patrol TD, árg. okt. 88 til sølu.
Tlf. 224914

SUZUKI GSX 600 F
Árg. 92, til sølu. Koyrt 75.000 km. Er í góðum standi.
Tlf. 223768

DEKK
Fýra heilársdekk, Riken 165/80R13, lítið sum onki koyrt, til sølu fyri 1.000 kr. Eru á Mazda felgum.
509787

FORD SIERRA
Ein vínreyður Ford Sierra 200i við motorskaða til sølu fyri 5.000 kr. árg. 91.
Tlf. 223466/371291/224181

BMW 316
árg. 87, til sølu. Sýnaður síðst í 2003. Hevur koyrt 88.000 km.
Tlf. 375186

NISSAN KING CAB
árg. 88, til sølu.
Tlf. 216581

HEILÁRSDEKK
Næstan óslitin heilársdekk á alufelgum stødd 195/60-15, til sølu fyri kr. 2.500,-
Tlf. 554508

GER KVETTI
Ein Ford Fiesta 1.8 Diesel frá 09/94 til sølu. Bilurin er nýsýnaður, hevur tvey sett av felgum v/ dekkum (14" Sportfelgur) cd/mp3/wma-spælara. Kamreim, dynamoreim, dynamo, stoyt-doyvarar, oljufiltur, olja, bremsurør, svingarmar, stýriliið og akkumulatorur nýliga skift. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 250692/251819

VW GOLF II
Ein VW Golf II diesel frá 1986 til sølu. Júst umvældur fyri 5000 kr + nýggj dekk framman. Toppstykkið farið + nakrar aðrar áboður mugu gerast.
Tlf. 315491, eftir kl 18 mob 211454

MERCEDES VITO
árg.1997, vørubilur 2500 TD, kr. 76.000,- + mvg.
Tlf. 223737

BILUR TIL SØLU
Ein VW Pasatt, árg. 87, nýsýnaður, nýggj summardekk við sportfelgum og pikadekk á felgum, biliga til sølu.
Tlf. 741225

EIN TOYOTA CAMRY 2.0I (SV21) TIL SØLU
Árg. 89. Har fylgir eitt gott stereoanlegg v/diskbox og subwoffer við fyri 10.000 kr. Ringjast kann á
Tlf. 455711 ella 220353

FORD ESCORT CLX 1.8i
árg. nov. 95, sær sera gott út og í góðum standi. Fá meira at vita um bilin við at ringja
tlf. 215060

SCANIA 143 H
árg. 1990, 6 x 4 v/ skiftilast til sølu. Sýnaður í februar 2004.
Tlf. 210493

NISSAN MICRA GX 1.6v
árg.04/99 silvurgráur. Til sølu um hóskandi boð fæst. Sær gott út og er í sera góðum standi, er nýliga tecktyleður í botnimum, koyrt einans 65.000 km. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 227712/310711

VW CARAVELLE
til sølu, krevur áboður.
Tlf. 214716

FORD FIESTA GHIA 1.1
árg. 87, koyrir enn, men krevur áboður. Góður sum eykalutir, bíliga til sølu.
Tlf. 319466

FORRÚTUR TIL NISSAN
Bluebird modell T 12 árgang 86, ynskist til keyps. Áhugi er eisini fyri øðrum eykalutum.
Tlf. 321451 og 256851

TOYOTA CAMRY GXI
Ein svartur Toyota Camry GXI V6 aut. Árg 88. til sølu. Bilurin sær sera gott út og er í góðum standi, skift motorin í 2003, bilurin hevur nógva útgerð, hevur 16" sportfelgur og koyrt einans 148000 km. Gev eitt boð á
tlf. 227712/310711

MAZDA B2500
pick up árg. 1997, diesel, til sølu.
Tlf. 421142

TIL SØLU
Vælhildin Toyota Starlet 1.3i til sølu.
Tlf. 223133

VIÐFESTIVOGNUR
ongantið brúktur, er til sølu.
Tlf. 721225

BILUR TIL SØLU
Ford Escort van 1.8, vøruvognur, km. 78.000.
Tlf. 210608 ella 372608

TIL SØLU
Saab 9.5 við skaða, árg. 98, koyrt uml. 68.000 km, verður seldur fyri 18.000 kr. Ring
Tlf. 583388 ella 580474

OPEL VECTRA 2.0
árg. 92, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 213050

NISSAN SUNNY 1.4 LX
árg. 89, sýnaður í januar 2004 í góðum standi, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 212223

OPEL ASCONA 2.0i
árg. 1987 til sølu. Krevur umvæling áðrenn umsýn. Nógvir góðir eykalutir. Bilurin hevur plátur. Selist fyri 5.000 kr.
ring 265182

PEUGEOT 106
1.5, diesel, 190.000 km, árg. 12/96, er sera økonomiskur, til sølu.
Tlf. 503820

JEEPUR TIL SØLU
Kia Sportage frá 98 í góðum standi kr. 65.000.
Tlf. 220615

GOTT KEYP!
Reyður Honda Accord 1.8i árg. 98, 83.000 km, nýsýnaður, sum nýggjur – ein eigara. Prísuppskot 84.000,-
Tlf. 543041

Amboð

SLÁIMASKINA
Lítið brúkt sláimaskina av merkinum »Tielbürger«Liggin er 65 cm langur, til sølu fyri 6000 kr.
Tlf. 447830

Arbeiði

TILBOÐ YNSKIST
Uppá at pussa eina trappu á Argjum.
Tlf. 315543 ella 211711

VASKIARBEIÐI Í HAVN
Álítandi tilkomin kvinna átekur sær at gera reint fyri fólk í Havn. Ikki ov langt úr miðbýnum/eystur-/vesturbýnum.
Tlf. 316219

ARBEIÐI
18 ára gomul genta, átekur sær at gera reint fyri fólk í Vágoynni. Løn eftir avtalu. Er hetta nakað fyri teg?
Tlf. 253713 / 333139

ARBEIÐI YNSKIST
Rosk 45 ára gomul kona søkir arbeiði – køks ella annað hevur áhuga.
Tlf. 259047

FA. HÚSAUMVÆLING OG HÚSASMÍÐ
Alt timburarbeiði verður gjort. Nýtt sum gamalt, úti sum inni. Royni okkum.
Tlf. 215214

Barnaansing

UNG MAMMA
Ung mamma bjóðar sær til at passa børn, í tíðarskeiðinum 12. juli - 6. aug. 2004. Áhugað kunna ringja á
tlf. 516130

VÁR OG BJØRK
(3 og 6 ár) søkja barnagentu í summarferiuni meðan mamma arbeiðir. Talan er um annaðhvørt vikuskifti og alla viku 29 og 30. Áhugað vinarliga ringið á
tlf. 519530

HEY
Eg eri ein 12 ára gomul genta, ið fegin vil passa børn í Vágunum, sera álítandi.
Ring ella sms til 266074

Barnaútgerð

SIMO KOYRISTÓLUR
Svartur/koksgráur við lufthjólum, regulerbærum hondtaki, selum, fluguneti og regnslag til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 211202

TREMMUSONG
Lítið brúkt tremmusong v/madrassu til sølu fyri 600 kr. Nýprísur 1.300 kr.
Tlf. 320348

SNUGLIPOSE
Snuglipose (NY) sælges for 400,-
Ring 322120 eller 522120

KOMBIVOGN
Brugt 2 mdr. sælges med alt tilbehør, såsom regnslag, pusletaske, fluenet, kørepose, indkøbsnet, lift, madrasser for 3.250,-
Ring 322120 eller 522120

ODDER BARNAVOGNUR
Lítið brúktur myrkabláður Odder barnavognur v/lift, madrassum, flugunet og sela til sølu fyri 3.000 kr. ella hægsta boð yvir. Nýprísur 7.299,-
Tlf. 548530

BARNAVOGNUR
Ljósagráur leðurlook Brio við lift. Vælhildin, til sølu fyri 1.000,- kr.
Tlf. 268668/422568

YMIST TIL SØLU
Simo barnavognur, vælhildin, myrkabláur, fyri 2.500,- kr.
Koyristólur (klapvognur), stórur við kalesju, bláur, fyri 800,- kr.
Grulvigarður, vælhildin, fyri 300,-
Tlf. 310039 eftir kl. 18

TIL SØLU
Myrkabláur tvíburastólur bíliga til sølu.
Tlf. 313216

TIL SØLU
Simo koyristólur fyri 500 kr. og ein babyalarmur fyri 400 kr.
Tlf. 271790

KOYRIPOSI
Koyriposi ynskist til keyps.
282528

BARNAÚTGERÐ
Simo kombivognur við ollum tilhoyri. Britax bilstólur 9-18 kg. til sølu.
Tlf. 228915 ella 284605

Bátaútgerð

SVØVLALÍNA/BINGJA
30 stk. óbrúkt lína á 100 favnar + 100 sløvlar reyð 3,5 mm min. prísur 295 stk., 20 fóts bingja til sølu.
Tlf. 210988 ella 423555

TIL SØLU
Volvo Penta 2000 – 18 HK aksul – skrúva regulerings greiðir fylgja við.
Tlf. 422267

BÁTUR TIL SØLU
Vanligur glasfipurbátur. Nýtt VHF sendara og tvær nýggjar lensipumpur og nýggja hondpumpu og nýggjar laternir, báturin gongur gott.
Tlf. 224883

TIL SØLU
25 hK Mercury leysamotorur við tanga. Til sølu fyri kr. 9.000,-.
Tlf. 371558 - 571558

BUKH MOTORAR
2 Bukh motorar DV20, vælegnaðir sum eykalutir til sølu. Gearini eru í góðum standi. Aksil og skrúva so gott sum nýggj. Ring
Tlf. 214844

TIL SØLU
Eitt fiskiloyvi til sølu. Bólkur 5B.
Tlf. 224986/222004

BÁTUR TIL SØLU
7 mannafar við 14 HK páhangara, bygt í 1980.
Tlf. 741225

NÝGGJUR GUMMIBJARGINGARBÁTUR
til 4 persónar selist vegna feilkeyp. 1 mán. gamal. Ikki verið í báti.
Tlf. 215609

LÍNUSPÆL
samanbygt við línurullu, hevur fýra línubustir, sær út sum nýtt.
Tlf. 447692

Bingo

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 11. juli kl. 16. Gávukort til øll spølini, 75 – 150 – 500 kr. Á lutaseðli 13 x 100 kr. og 2 gávukort á 2.000 kr. frá Smyril Line. Bingola, eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

BINGO
Bingo verður í Felagslonini leygarkvøldið 10. juli kl. 19. Á lutaseðli: 2 ísl. krov.
Eldrafelagið Borgin

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba leygardagin 10. juli kl. 20.00.
Nevndin

GOTT BINGO
verður leygardagin 10. juli kl. 20 í Tórshøll, gávukort, kjøt og nógv annað at vinna. Eisini verður spæl, minibingo, 20 kr. spæl og bingola.
Tórshøll

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Pálstovu mánakvøldið 12. juli, kl. 19. Nógvir góðir vinningar. At vinna til fulla plátu verður aðru hvørjuferð turt tjógv og aðru hvørjuferð gávukort. Eisini verður bingola og eykaspæl. Koyring heim aftaná.
Astma- og Allergifelagið

Burturm. /funnið

Á LPK-LEGU
á Selatræð misti eg burtur: gummistyvlar, hettutroyggju við prenti, fóðraða fleece-jakka og svarta »Snoopy«-toilettasku við pengum og heilivági. Um nakar veit hvar hesi eru, so vinarliga sigi frá á
tlf. 313314 ella 513314, Kristjan

HALLÓ!
Tú, um lat meg inn á Tinghúsvegnum til umvælingar, vil eg biðja um at koma eftir mær. Nú eri eg klárur, men tlf.nr. hjá tær er burturmist.
Heilsan Ruggustólurin

REGNJAKKI
Tann sum av misgávum tók mín grøna Helly-Hasen jakka á Hafnia 30. juni millum kl. 20-23, verður biðin um at seta seg í samband við meg.
Tlf. 223366

Býli

ÍBÚÐ TIL FRAMLEIGU
Íbúð, 54 fermetrar við ella uttan møblar í Keypmannahavn til framleigu alt summar og evt. longur. 4500 kr. um mðr. 10-15 min. til city.
Tlf. +45 77309328

ÍBÚÐ SØKIST Í HAVN TIL TRÚGVANDI
Fyri sámuligan prís, til ein sum hevur arbeiði.
Tlf. 264903 ella 314805

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Íbúð ynskist til leigu í høvuðsstaðarøkinum frá umleið hálvum august. Eg eri einlig mamma við 3 børnum. Havi fast arbeiði. Ring
Tlf. 264340

KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur friðarligur maður ynskir kamar ella íbúð skjótast gjørligt.
Tlf. 260558, Gert

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH
Ungt par ynskir íbúð í Keypmannahavnar økinum, í samband við lestur. Roykja ikki, fara væl um og gjalda til tíðina. Alt hevur áhugað. T-post:
gunnpjoensen@hotmail.com
Tlf 315911/503058 og 515911

HÚS Í SØRVÁGI TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332301

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Uml. 45 fermetrar við el og hita. 4.500 kr. um mánaðin. Einans egna til einligan persón.
Tlf. 218664

SUMMARHÚS Í LEYNUM!
Hevur tú hug at njóta nakrar dagar ella eitt vikuskifti í Leynum, so er møguleiki at leiga eini nýumvæld eldri hús við øllum hentleikum. Barnavinarligt umhvørvi. Ring og hoyr nærri. Ása 443321/212249 ella Gunnvør 313029/503029
Tlf. 443321/313029, Ása og Gunnvør

KJALLARAÍBÚÐ
til leigu til friðarligt par, 2 kømur, køkur og stova í einum, wc og kjallari til vaskimaskinu. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1870/3

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er tað nakar, sum hevur eina íbúð í KBH, sum vit kunnu leiga fyri ein sámuligan prís, bert eina nátt frá 23.-24. juli.
Tlf. 254452, Sonny

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU
á Tvøroyri ella nærhendis fyri sámuligan prís.
Tlf. 584100

SUMMARFRÍ Í ODENSE
Er onkur sum kann leiga mær íbúð/kamar í Odense í umleið 1 viku fyrst í august? Fari væl um. Prísuppskot uml. 1200 kr.
Tlf. 313372, 226692 ella e-post: olselsba@hotm

SUMMARÍBÚÐ
til leigu í Keypmannahavn. Íbúðin liggur mitt í býnum í hugnaliga umhvørvinum á Christianshavn. 3 min til »Strøget«, 10 min til strondina.
Tlf. +45 26187852

SKIFTA UM ÍBÚÐ
Er tað nakar sum hevur hug at skifta um íbúð og bil í tíðarskeiðinum 19/7-7/8. Íbúðin liggur á Nørrubrúgv í Keypmannahavn. Tín skal liggja í høvuðsstaðar umráðnum. Bilurin skal vera í koyriforum standi. Vit eru tvey vaksin og eitt barn.
Ring +45 20701401

HÚS Í KVÍVÍK TIL LEIGU
frá 1. aug. 2004. 120 fermetrar. Standa í friðarligum umhvørvi. Leigarar mugu ikki hava húsdjór. Prísur 3.500 uttan ljós og hita.
Tlf. 266133 ella 421280

STÓRT KAMAR TIL LEIGU
við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. Nær við læraraskúlan.
Tlf. 221158/313799

2-RÚMS ÍBÚÐ (BÝTI)
Eg ynskir at býta íbúð – havi 2 rúms íbúð á Amager – ynski íbúð í Havn ella hús á Skála frá 15. september í eitt ár.
Tlf. 504327

SUMMARFRÍ Í HERNING!
Í tíðarskeiðnum 15.--28. aug. 2004 er ein møblerað íbúð til leigu, 2 kømur, stova, køk og 2 wc, barnavinarligt umhvørvi.
Tlf. +45 97122595 ella 24251956

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung kvinna søkir íbúð í Havn, á Argjum ella í Hoyvík skjótast gjørligt. Eg lúki tey krav, ið skulu til fyri at vera ein góður leigari. Eg havi fast arbeiði.
Vinarliga ring tlf. 251360

ÍBÚÐ SØKIST
Ung genta, ið skal byrja í læru søkir lítla íbúð ella kamar í miðstaðarøkinum fyri sámuligan prís. Eri friðarlig og fari væl um.
Vinarliga ring á: 423214/250955

ÍBÚÐ Í KBH YNSKIST!
Ungt par søkir eina íbúð í KBH skjótast gjørligt vegna lesna. Fara væl um og gjalda til tíðina. Alt hevur áhugað.Um tú kanst hjálpa okkum, vinarliga ring á
tlf. 258085

HÚS Í SKOPUN
til leigu.
Tlf. 361558 best eftir kl 18

KAMAR YNSKIST
Kamar ynskist í Havn frá 1. aug. Eg havi fast arbeiði og gjaldi til tíðina, max 1.600 kr.
Vinarliga ring 251055

HÚS Í GØTU
Hús ynskjast til leigu í Gøtu. Vit eru maður, kona og tvey bøtn, sum flyta til kommuna í summar.
Tlf. 372608 ella 210608

ÍBÚÐ/HÚS YNSKJAST
til leigu í Tórshavnar umráðnum av ikki roykjarum og góðum gjaldara.
Tlf. 224910 ella 317865

KAMAR TIL LEIGU
Í Keypmannahavn við atgongd til køk, bað, internet og vaskimaskinu.
Tlf. +45 22313071

KAMAR YNSKIST
Kamar ynskist í Havn frá 1. aug. Vinarliga ring
Tlf. 251055

KØMUR
Er tú friðarligur og fer væl um, havi eg nøkur kømur við atgongd til køk og bað til leigu.
Tlf. 316916 ella 506489

Dansur

FRÁ VESTURHØLL Í FÁMJIN
Túnadansur verður leygardagin 10. juli. »Hans Jacob og vinmen« spæla.
Vesturhøll

Dýr

KETTLINGUR BURTURBLIVIN
Ein gráur kettlingur við hvítum labbum og hvítari bringu, hann hevur brúnt hálsband v/ svørtum plettum er burturblivin á Djúpagilsvegnum sunnudagin. Hevur nakar sæð hann, vinarliga ring
tlf. 310349/210349

SVARTUR, GRÁUR, HVÍTUR KETTLINGUR
Burturblivin á Argjum sunnudagin. kennist nakar við hann, vinarlig ring
Tlf. 318824 ella 270087

HVØR EIGUR MEG?
Ótrúliga fittur brún/svart ríputur kettlingur funnin í Onnugotu í Hoyvík. Eg vil sleppa heim! Skundið tykkum eftir mær!
Ring 210506

YNSKIST
Dvørgakaninir ynskjast.
Tlf. 332113/212213

KETTLINGAR FÁAST
Tveir fittir kettlingar, frensar, eru reinligir, annar svartur, hin gráur og hvítur, kunnu heintast beinanvegin. Bert til djóravinir.
Tlf. 422389

HESTUR TIL SØLU
9 ára gamal ríðingarhestur til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 225754/361293

6 SERA FITTIR HUNDAHVØLPAR
Latast djóravinum uml. 1. aug. Vinarliga ring
Tlf. 311782

KETTLINGAR
Sera fittur svartur kettlingur (frensur) verður latin djóravini. Dugir at eta og leppa, er reinligur. Lagdur 21. mai.
Tlf. 423032 311884

KANINIR
Tvær dvørgakaninir latast til djóravin vegna flyting.
Tlf. 250051

HUNDAHVØLPAR
Tríggir hundahvølpar, tveir hannar og ein hon av collieslag verða lætnir djóravinum. Fittir, reinir og friðaligir.
Ring til okkum á 448074

DVØRGKANINUNGAR TIL SØLU
Ein hon og ein hann, eru systkin og eru lagdir tann 3. april 2004, til sølu fyri 150 kr. stk. Ring ella sms'a á
Tlf. 258283

UNDULATAR
6 undulatungar, 2 undulatar, ið eru 1 ár, og eitt par av undulatum, og eitt búr. Tað størsta sum man fær, til sølu.
Tlf. 332921, áðrenn kl. 17.00

KANINUNGAR
Tveir sera fittir dvørgkaninungar, sum hava heingioyru til sølu. Latast í viku 31.
Tlf. 322921 áðrenn kl. 17.00

GOLDEN RETRIVER HVØLPUR
Hvølpur (tík) fødd 18.05.04 við stamtalvu til sølu. Ring og hoyr meir á
Tlf. 512123

SJÓRAANSING
Eg eri ein 13 ára gomul genta, sum kundi hugsa mær at ansa onkrum djórum í summarfrítiðini.
Tlf. 322134

HEY KETTUVINUR
Eg eri ein sera fittur hvítur og gráur kettlingur (genta), ið mangli eitt gott heim. Eri fitt, spøk og von við born, um tú vilt eiga meg, vinarliga ring
Tlf. 322234, heilsan Askepot

HUNDAHVØLPUR
Ógvuliga fitt tík, lødd 21. april, til sølu. Ættartalva fylgir við. Kann latast nú.
Tlf. 423544 - 508010

NÓG VAKSIN AT FLYTA HEIMANIFRÁ
Eg eri ein sera fittur kettlingur, sum eri reinligur og dugi at eta og leppa. Mær dámar væl at spæla, men mamma tímir ikki at spæla við meg longur.
Ring á tlf. 311033/227767

3 FITTIR HUNDAHVØLPAR
Kunnu latast til djóravin. Verða ikki stórir.
Tlf. 258668 Lív

KETTLINGAR
Tveir sera fittir kettlingar verða lætnir djóravini. Ein er svartur og hin er svartur og hvítur. Báðir eru kettur.
Ring 254315

FITTIR HUNDAHVØLPAR
1 hundur og 2 tíkar kunnu fáast við at ringja
tlf. 503560 ella 756819

ÍSLENDSKT ROSS
5 ára gamalt íslendskt ross, við góðari ættartalvu, til sølu.
Tlf. 315797/507303

HUNDAHVØLPAR
fáast við at avheinta teir. Verða bert latnir til djóravin.
Tlf. 211600

Húsarhaldstól

TIL SØLU
Whirlpool køliskáp uml. 1.33 m høgt. Bert 3 ára gamalt. Fæst bíliga.
Tlf. 583388

YNSKIST
Eimhetta ynskist.
Tlf. 312539

KØLISKÁP TIL SØLU
Eitt fimm ára gamalt Zanussi ZFT 155 køliskáp til sølu fyri 1200 kr. Tað er í sera góðum standi.
Tlf. 318024

FRYSTIBOKS TIL SØLU
Merki: Gram, árg. 2000, Ltf. 414. Prísur 2.000 kr.
Tlf. 216469

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Frystiboks (Vestfrost) , sum nýggj. Mál 73x61x81cm. Kr. 1000.
Tlf. 372703

TIL SØLU
Whirlpool køliskáp, uml. 1,33 m høgt. Bert 3 ára gamalt, fæst bíliga.
Tlf. 583388

Innbúgv

BRÚKTUR KØKUR
Brúktur kompl.køkur v/hv. skápshurður til sølu.
Tlf. 261543

DUPULTSONG TIL SØLU
Svørt metall song til box-madrassu (frá Skemmuni). Stødd: 140x200. Til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 503032

TIL SØLU
8 lyklaklárar innhurðar, eru brúktar. Hædd 2,10m. Breidd 80 cm.
Tlf. 373091

SOVISOFA OG SOFABORÐ
Vanlig sovisofa, 1.500,- kr. og eitt sofaborð, 300,- kr., vælegnað til ungdómskamar ella gestakamar.
Tlf. 581378

KLÆDNASKÁP TIL SØLU
Klædnaskáp – loft til gólv – við dragihurðum 123 cm. br. til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 210554

SKENKUR TIL SØLU
Myrkt træ. Lítið brúktur. Nýprísur kr. 5.400 - selist fyri kr. 2.000
Ring 225100

Matur

TIL SØLU
Saltað grind og spik til sølu.
Tlf. 332342/224877

Pløgg

FUNNIÐ
Ein myrkamorreyð opin troyggja frá Snælduni funnin 28. juni omanfyri vatnbrunnarnar við Sundsvegin.
Tlf. 268875

SKJÚRT
til føroyska búnan str. 10-12 ár til sølu.
Ring 373860

TIL SØLU
Troyggja til føroyskan kvinnubúna, stødd uml. S, tils ølu.
Tlf. 373972/266908

MYRKABLÁ TROYGGJA
til føroyska mannfólkabúnan, óbrúkt, stødd L, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 724581 eftir kl. 16

BROSJA OG SPENNI TIL SØLU
til føroyska búnan til sølu, tað er hestaskógvur og tann minna støddin. Verður selt bíliga.
Tlf. 505908 eftir kl. 17

TIL SØLU
1 stk. myrkamorreyð troyggja 1 - 1 1/2 ár. Mátar 32 cm frá økslini, bíliga til sølu.
Tlf. 583388

TIL SØLU
Myrkablá mannfólkatroyggja, nýggj til sølu, longd 63 cm. ermalongd 45 cm.
Tlf. 310992 eftir kl. 18 ella 226025

GRAVIDITETSTØJ
(Fra H&M, Benetton, Events) Str. M(38-40) bla. kjole, strømpebukser, bukser, toppe, bluser, køb hele papkassen for 1000,-
Ring 322120 eller 522120

YNSKIST
Mynstrut troyggja til føroysk klæði stødd 3-4 ár (drong).
Tlf. 510860

TIL SØLU
Skjúrt til føroyska búnan str. 38-40.
Tlf. 509790

TIL SØLU
Sera vakrir nýggir beigefarvaðir Buffalo skógvar, opnan hæl, str. 38, til sølu fyri 600,-
Tlf. 509790

TIL SØLU
Buksir til føroyska búnan til smádrong 4-6 ár.
Tlf. 258967

VAKURT
blátt hondbroderað silki turriklæði og fyriklæði til smágentu 5-7 ár.
Tlf. 258967

TROYGGJA
til føroyska kvinnubúnan stødd 44 og eitt reytt broderað vestastykki stødd ca. 5 ár til sølu.
Tlf. 252375

Samband

EFTERLYSNING
Som teenager havde jeg mange pennevenner, bl.a skrev jeg sammen med pige fra Færøerne, kontakten gik tabt efter nogle år, men nu synes jeg det kunne være spændende om det ville være muligt at finde fremtil hende igen. Hendes navn er Elsebeth Debess og på postkort der er stemplet december 1962 har hun satsreg under Torshavn, så formentlig boede hun der, i 1962 har Elsebeth formentlig været ca 12 år, jeg har et billede af hende i spejderuniform (grøn spejder). Jeg hed dengang Mette Hansen og boede i Vesterborg på Lolland. Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1870

HVØR EIN FITT
og lágvaksin havnadidda vil svara einum 56 ára gomlum bygdafrelli úr Eysturoynni. Ger nú títt besta. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1868/1

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 13. juli kl. 19.00
Kafé Blákross

Súklur

KNALLERT TIL SØLU
Yamaha FS 1 nýistandsett og hópur av eykalutum so sum stell, motorar, tangar og annað til sølu. Samlað ella hvørt sær.
Tlf. 228894

APRILIA TIL SØLU
RX50 blá í góðum standi, selist vegna bilkeyp.
Tlf. 441950/220618

TIL SØLU
1 kondisúkkla og ein gentusúkkla 8-10 ár, lítið og einki brúkt.
Tlf. 224181/371291 eftir kl. 18

TIL SØLU
2 stk. dreingjasúkklur: Whiher 18x1,75, Rocky 20x1,75 fáast bíliga.
*Tl